

Havnar leksikon:

# Konfirmantar frá 1920

**Nakað síðan høvdu vit her í blaðnum hesa somu myndina av konfirmantum frá 3. oktober 1920. Fleiri av nøvnunum eru komin upp á pláss, men enn mangla nøkur. Vónandi kann onkur av lesarum okkara hjálpa til við at fáa tey seinastu nøvnini upp á pláss**

Aftara rað f.v.: Ókendur, Christian Ernst Mittún, Søren Edvard Danielsen (Hestur), ókendur, Christian Joensen, Johan Petur Joensen (Hestur)

Mittasta raði f.v.: Ókendur, Else Margrethe Sofie Jacobsen, Hans Poulsen (Nólsoy), ókendur, Peter Ejvind Evensen, Jacob Mortensen (Argir), Olaf Zacharias Zachariasen (Hestur), Henry Anton Djurhuus, ókendur, Christian Anton Johansen, Eyvind Isholm, Sigmund Oliver Groth Jacobsen (Nólsoy), og Erling Isholm

Fremra rað f.v.: Elisa Wenningsted Rein, Ninna Helene Rigmor Reinert (Kaldbak), ókend, Ebba Cathrine Rein, ókend, Sara Marie Mikkelsen, Gunhild Poulsen (Velbastaður), Turid Vang (Kaldbak), Christiane Sofie Elisabeth Dalsgaard (Velbastaður), ókend, ókend, ókend, og Elise Rein.

22 gentur vórðu fermdar hendan dagin, men á myndini eru bert 15, og 20 dreingir vórðu fermdir og 17 eru myndini.

Av tí at myndin ofta varð tikin vikuna eftir konfirmatiónina, var tað nokk so vanligt at ikki allir konfirmantarnir møttu upp til myndatøkuna.

Tey 13 gentunøvnini sum ikki eru komin upp á pláss eru: Johanne Pauline Sofie Jovine Henriette Lambaa, Rachel Johannessen, Hanna Kathrine Frederikke Olsen, Esther Mathilde Pilgaard, Andrea Frederikke Mortensen, Regine Marie Vilhelmsen, Bjørghild Poulsen, Gerda Sofie Pouline Vilhelmsen, og Carla Jacobine Vægter, allar úr Havn. Ellen Elisabette Margrethe Joensen (Nólsoy), Julie Mortensen (Argir), Juliane Marie Nolsø (Kaldbak), og Johanne Elisabeth Christine Poulsen (Hestur).

Tey 7 dreingjanøvnini, sum ikki eru komin upp á pláss, eru: Gerhard Reginus Vilhelmsen, Sophus Djurhuus Andreasen, Joen Jacob Tauser Olsen, Magnus Eli Arge, allir ú Havn. Jacob Nolsøe (Kaldbak), Olaf Johannesen (Hestur) og Jens Herluf Thomsen (Nólsoy).

Sum tað sæst á myndini, eru bert 32 konfirmantar avmyndaðir, 10 eru ikki við á myndini. Um onkur av lesarum okkara veit um onkran, sum ikki er við á myndini, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen í telefon 314647 ella 273168.

## Andlát & jarðarferðir

Ingibjørg Fredrikka Hansen, Mikladalur, ættað úr Skálavík andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánadagin 23. mai, 87 ára gomul. Kistan fer frá kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hósdagin klokkan 16:30. Jarðarferðin verður úr Mikladals kirkju fríggjadagin klokkan 14.

Sam siglir av Leirvík til Klaksvíkar klokkan 11.45 og eykatúr av Klaksvík til Syðradals klokkan 12.30.

Tey, ið vilja minnast Ingibjørg, kunnu lata Mikladals kirkju eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

Elsubeth Katrina Hentze, vanliga nevnd Tina, ættað úr Skopun, búsitandi í Hirtsals, andaðist á Ålborg Sjúkrahúsi týsdagin 24. mai, 41 ára gomul. Jarðarferðin verður mánadagin klokkan 12:30 úr kapellinum í Skagen.

Elin Zachariasen, Streymnes, ættað úr Nólsoy, andaðist 25. mai 75 ára gomul. Kistan fer av Sambýlinum í Kollafirði í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hvalvíkar kirkju leygardagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Elina, kunnu lata sambýlinum í Kollafirði eina gávu. Konto í peningastovnunum.

Gertrud Hansen, Nólsoy, andaðist 25. mai, 87 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Nólsoyar kirkju leygardagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Gertrud, kunnu lata Missiónshúsinum í Nólsoy eina gávu. Konto í Føroya Banka.

Kistan við Sigmund Arge Johannesen, Vestmanna fór frá kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin klokkan 17:30. Jarðarferðin verður úr Missiónshúsinum í Vestmanna fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Sigmund, kunnu lata eina gávu til Undirhúsið í Vestmanna. Konto í peningagstovnunum.

*Kelda: Útvarp Føroya*




Sosialurin
www.sosialurin.fo